# ÁRSFRÁSØGN
# 2013

RÁÐIÐ FYRI FERÐSLUTRYGD

# STATUS NULLHUGSJÓN

## 6 DEYÐ Í 2013

Ferðsluárið 2013 gjørdist syndarligt við 6 deyðum í Føroyum. Hetta talið er ógvuliga høgt í mun til onnur Norðurlond. Svøríki er einasta Norðurland, har talið á deyðum lækkaði í 2013. Í Danmark, Noregi, Íslandi og Føroyum hækkaði talið. Í Føroyum tó nógv mest. Umrokna vit til 100.000 íbúgvar, doyðu í Føroyum 12,5 í ferðsluni í 2013, meðan tølini fyri hini Norðurlondini liggja millum 2,7 og 4,7. Í Danmark doyðu 3,2 pr. 100.000. Tá íbúgvaratalið í Føroyum er lutfalsliga lágt, er rímiligt eisini at hyggja at 5 ára miðal fyri Føroyar, tað vil siga, tá vit rokna miðaltalið av inniverandi ári og undanfarnu 4 árini. 5 ára miðaltalið fyri 2013 er 5,8, sum er munandi hægri enn 4,7 (Finnland), sum er tað næsthægsta.

Hetta vísir greitt, at vit noyðast at seta ferðslutrygdina ovast á dagsskránna, tí vit koma ikki sovandi til tryggari ferðslu. Skulu vit bjarga fleiri lívum, krevur tað, at fleiri partar áhaldandi arbeiða við nullhugsjónini fyri eyga. Tað vil siga økt politieftirlit, tryggari vegir, tryggari bilar, kunningarátøk og undirvísing.

Vit hava tíverri ikki hagtøl og skaðakanningar, sum vísa orsakir til vanlukkurnar, men í øllum vanlukkunum í 2013 hevur løgreglan víst á ov nógva ferð sum part av orsøkini til vanlukkurnar.

## HVAT GERA VIT VIÐ STØÐUNA?

Starvsnevndin metir tað átroðkandi at Ferðslutrygdarætlanin veður dagførd í 2014.

Eisini á fundinum í Ferðslubólkinum 11. apríl 2012 var semja um, at Ferðslutrygdarætlanin 2007-2015 eigur at verða endurskoðað. Leisturin fyri komandi dagføring var somuleiðis umrøddur, har semja var um, at RFF eins og seinast var toghaldari á uppgávuni. Umráðandi er tó, at landsstýrismaðurin sum umsitur málsøkið formliga setur dagføringina í gongd. Tá ferðslutrygdarætlanin upprunaliga varð skrivað í 2007, varð hetta skipað sum ein verkætlan, skipað við einum stýrisbólki og einum arbeiðsbólki. Í stýrisbólkinm sótu umboð fyri Vinnumálaráðið, Landsverk, Akstovuna, Løgregluna, Kommunusamskipan Føroya, Føroya Kommunufelag og Ráðið fyri Ferðslutrygd. Í arbeiðsbólkinum sótu umboð fyri Landsverk, kommunurnar, løgregluna og Ráðið fyri Ferðslutrygd umframt at aðrar persónar luttóku eftir tørvi. Eisini var skrivari, settur av RFF, knýttur at arbeiðsbólkinum.

Starvsnevndin hevur í stuttum gjøgnumgingið tilmælini í verandi Ferðslutrygdaætlan,og er endað við yvirlitinum á næstu síðu. Hetta kann ikki verða mett sum ein dagføring, men bert ein meting við støði í okkara varhuga.

## DEYÐ Í FERÐSLUVANLUKKUM Í NORÐURLONDUM

**PR. 100.000 ÍBÚGVAR**




*MYND: Norðurlendsk hagtøl frá nvf*

Harumframt eru fleiri hugsandi nýggj tilmæli, sum ikki eru við í verandi Ferðslutrygdarætlan, men sum væntandi vera við í eini dagførdari. Til dømis tilboð um alkolás til rúsdrekkakoyrarar, har royndir úr eitt nú Svøríki vísa seg sera at vera sera góðar.

**Status fyri tilmæli í ferðslutrygdarætlanini**

* : nakað av ávirkan | ** : miðal ávirkan | *** : stór ávirkan

**Reytt:** Ikki byrjað | **Gult:** Ávegis | **Grønt:** Gjøgnumført

| | Ásett støða 2014 | |
|---|---|---|
| 34. Skaðakanning | Reytt | *** |
| 33. Hagtøl | Reytt | *** |
| 7. Sjálvvirkandi ferðkanningar | Reytt | *** |
| 35. Ferðslutrygdarbeiðið framyvir | Reytt | *** |
| 20. Beltiáminnari | Reytt | *** |
| 13. Seyður burtur av vegnum | Reytt | *** |
| 25. Venjingarbreyt | Reytt | ** |
| 30. Koyrikortið til bil | Reytt | ** |
| 5. Koyri- og hvílitíðarreglur | Reytt | * |
| 15. Landsvegir uttan um bygt øki | Gult | *** |
| 6. Løgreglueftirlit | Gult | *** |
| 28. Íbundin børn | Gult | *** |
| 32. Kommunalar ferðslutrygdarætl | Gult | *** |
| 27. Økt nýtsla av súkkluhjálmi | Gult | *** |
| 22. Átøk | Gult | *** |
| 16. Møguleikar fyri tryggari yvirhál. | Gult | *** |
| 12. Skilja bleyta ferðslu frá harðari | Gult | *** |
| 11. Ferðslutryggja vegamót | Gult | *** |
| 26. Ferðslufrálæra í dagst. og skúlum | Gult | ** |
| 29. Koyrikort til prutl | Gult | ** |
| 19. Talgilt vegakort | Gult | ** |
| 31. Kollektiva ferðslan | Gult | ** |
| 9. Indráttur av prutli | Gult | ** |
| 10. Hámarksferðin lagast til vegakerv | Gult | ** |
| 8. Próvalkometur | Gult | ** |
| 3. Øll í trygdarbelti | Grønt | *** |
| 4. Sektarhækking | Grønt | *** |
| 18. Ferðslutrygdargranskoðan | Grønt | *** |
| 24. Ferðgáar v.m. | Grønt | *** |
| 17. Rumlistrípur | Grønt | ***/** |
| 1. Promillumarkið lækkast | Grønt | ** |
| 2. Nullmark fyri onnur rúsandi evni | Grønt | ** |
| 21. Stuðla trygdartiltøkum | Grønt | ** |
| 23. Greiðari kunning um reglur fyri útskriving av heilivági | Grønt | ** |
| 14. Dagføra tunlar | Grønt | * |

Her skal gerast vart við, at fleiri av tilmælunum standa sum gul, tað vil siga sum verandi 'ávegis', tó at hesi sum so ongantíð verða liðug. Hesi tilmæli eru í eini skipaðari tilgongd.

## NORÐURLENDSKT SAMSTARV

Samstarvið millum norðurlondini, Ísland, Danmark, Noreg, Svøríki, Finnland og Føroyar hevur ligið stilt síðan januar 2013, eftir at danski, norski og svenski stjórarnir allir løgdu frá sær. Í august 2014 verður ársfundurin væntandi í Havn.

# VIRKSEMI 2014

## UNDIRVÍSINGARTILFAR

Síðan 1. januar 2013 hevur verið arbeitt við at útvega undirvísingartilfar til fólkaskúlan í ferðslu. Ferðsla er álagt undirvísingarevni í fólkaskúlanum. Varhugin er, at tað í ávísan mun verður undirvíst í ferðslu í heimstaðarlæru, sum er í 1.-3. flokki, tó at tað tykist vera eitt sindur misjavnt.

## NÝTT TALGILT TILFAR

Ráðið hevði frá byrjan í hyggju, at undirvísingartilfarið skal vera teldutøkt. Hetta so at tilfarið gerst lætt atkomuligt hjá lærarum, foreldrum og næmingum og er óheft av fígging, tíð og staði.

Eftir at hava kannað undirvísingartilfar í grannalondum okkara, gjørdist greitt, at norska og danska tilfarið er tað nýggjasta, sum hóskar best at brúka í Føroyum. Í danska vóru møguleikarnir í talgildum undirvísingartólum best gagnnýttir. Bæði danska og norska ferðslutrygdarráðini lótu okkum fegin tilfar sítt til at nýta eftir tørvi.

## SAMSTARV VIÐ NÁM OG MMR

Talgilta tilfarið verður hýst á snar.fo, har alt liggur klárt til komandi skúlaársbyrjan. Nám hevur frá byrjan tikið uppgávuna í stórum álvara og lagt ta neyðugu orkuna í at samstarva við Ráðið fyri Ferðslutrygd um at gera funkurnar klárar. Eisini Mentamálaráðið hevur verið sera samstarvssinnað, tá samstarvað hevur verið um tilvísingarbólk og skeið fyri lærarum um tilfarið.

## ENDURSKINSVESTAR

Tað var í samstarvinum millum Ráðið fyri Ferðslutrygd og Tryggingarfelagið Føroyar, at hugskotið um endurskinsvestar, sniðgivnir av Guðrun & Guðrun, birtist. Endamálið var í fyrra lagi at sniðgeva og framleiða endurskinsvestar, sum ung vildu nýta. Ofta vísir seg nevniliga, at ungfólk gevast at brúka endurskin, tá tey eru um 12 ára aldur. Tí skuldu hesir vera soleiðis sniðgivnir, at ung tóku teir til sín. Í seinna lagi var endamálið, at inntøkurnar av søluni av endurskinsvestunum skuldu óskerdar fara til at framleiða dagført undirvísingartilfar í ferðslulæru til fólkaskúlan. Guðrun Ludvig frá Guðrun & Guðrun sniðgav vestarnar.

Hetta gjørdi tað møguligt hjá Ráðnum at seta fólk at leiða og fremja verkætlanina at fáa til vega undirvísingartilfar. 1. januar 2013 setti Katrin Didriksen Apol, cand. mag. í miðlavísindi, skjøtul á verkætlanina. Tá hon fór í barnsburðarfarloyvi, tók Birna Abrahamsen, cand. negot. yvir.

## FERÐSLAN VANDAMEST HJÁ ELDRI NÆMINGUM

Eins og í grannalondum okkara er líkt til, at tað, sum verður undirvíst í ferðslu, í mestan mun er í skúlabyrjanini. Hareftir hava bæði lærarar og foreldur lyndi at halda, at nú duga børnini at venda sær í ferðsluni, so nú er lítið at fara eftir í so máta. Men hagtølini siga nakað heilt annað: Tá børnini eru 15 ár, standa tey á gáttini til tey 10 vandamestu árini í ferðsluni. Tað er í hesum tíðarskeiði, at tey ungu eru yvirumboðað í ferðsluvanlukkum, bæði sum skadd og deyð. Undirvísing í hesum árum er tí av størsta týdningi.

## SAMSTARV VIÐ FORELDUR

At vanar hjá foreldrum hava týdning fyri hugburð og atferð hjá børnum er flestum greitt. Nýggjar kanningar vísa, at foreldur sum fyrimyndir í ferðsluni enntá hava meiri at siga fyri tannáringar enn teirra javnaldrar. Tí leggur undirvísingartilfarið upp til samstarv við foreldur. Hetta í brævi í 1. og 6. flokki. Í framhaldsdeildini verður lagt upp til at viðgera ferðslu á foreldrafundum við einum stuttfilmi um ung og ferðslu, sum er umsettur til føroyskt.

## SKEIÐ Í VÁR

Í vár verður skeið í undirvísigartilfarinum fyri lærarum. Hetta fer fram á Námi í apríl, har lærarar úr øllum landinum hava høvi at luttaka.

> *Talgilta undirvísingartilfarið gerst lætt atkomuligt hjá lærarum, foreldrum og næmingum*



## SAMSTARV FYRITØKUR

Hitt nýggja økið, sum Ráðið fer í holt við í ár, er at arbeiða fyri at fáa í lag við fyritøkur um ferðslutrygga atferð í ferðsluni. Fleiri orsøkir eru til hetta. Hin fremsta er, at norsk kanning[1] vísir, at:

- vinnubilførarar til arbeiðis eru partur av 30 % av deyðsvanlukkum á norskum vegum
- vanlig starvsfólk, sum koyra í arbeiðistíðini, men ikki eru vinnubilførarar eru involverað í 6 % av av deyðsvanlukkum
- 10 % av vanlukkunum umfata ein ella fleiri sum koyra til/frá arbeiði

[1] *Kartlegging av arbeidsrelaterte trafikkulykker. Analyse av dødsulykker i Norge fra 2005 til 2010. TØI rapport 1188/2012. Av Ross Owen Phillips og Sunniva Frislid Meyer*

Taka vit hædd fyri at fleiri av hesum kunnu vera partur av somu vanlukku, vísa úrslitini, at tilsamans 41 % av deyðsvanlukkum í Noregi involvera í minsta lagi ein bilførara sum hevur koyrt í sambandi við arbeiði ella er á veg til ella frá arbeiði.

## CORPORATE SOCIAL RESPONSIBILITY

At taka samfelagsábyrgd sum fyritøka hevur verið á lofti í vaksandi mun seinastu tíðina. Uppløgd dømi um føroyskar fyritøkur, sum taka sosiala ábyrgd eru tey bæði tryggingarfeløgini, Trygd og Tryggingarfelagið Føroyar, sum saman stuðla ferðsluundirvísing fyri landsins 8. flokkum og við hjálmum til 1. floksnæmingum, umframt at tey hvør sær stuðla kunningartiltøkum hjá Ráðnum.

Í 2014 fara vit at bjóða okkum til at samstarva við fleiri føroyskar fyritøkur um ferðslutrygd. Her síggja vit fyri okkum, at vit leggja fyritøkum lag á millum annað at samtykkja og verkseta ferðslutrygdarpolitikk á fyritøkuni, sum hevði bøtt um ferðslutrygdina í arbeiðstíð, men væntandi eisini uttanfyri arbeiðstíð.

## HVUSSU KOYRA FØROYSK VINNUAKFØR?

Ráðið lat gera Gallupkanning, har føroyingar vórðu spurdir, í hvønn mun tey síggja at bilførarar við vinnubili (privatum ella almennum) koyra ov skjótt, og hvussu ofta tey síggja vinnubilførarar brúka handhildna fartelefon handan róðrið. Hetta sigur sjálvsagt einki um, hvussu vinnubilførarar koyra, men bara nakað um, hvussu føroyingar uppliva vinnubilarnar.

Eisini varð spurt, hvussu hugburðurin til fyritøkuna verður ávirkaður, tá bilførarar í vinnubilum bróta ferðslulógina.

## FØROYINGAR VARNAST LÍKASÆLA KOYRING

Tilsamans 40-46 % síggja dagliga ella fleiri ferðir um vikuna vinnubilar við bilførarum, sum ikki halda ferðslulógina.

**HVUSSU OFTA SÆRT TÚ BILFØRARAR Í VINNUBILUM (ALMENT ELLA PRIVAT) TOSA Í HANDHILDNA FARTELEFON?**

*(Tað vil siga bilar, ið hava sjónligan tekst ella búmerki. Altso ikki privatbilar)*




**HVUSSU OFTA SÆRT TÚ BILFØRARAR Í VINNUBILUM KOYRA OV SKJÓTT?**




Talvurnar vísa eisini, at líkasæli atburðurin hjá vinnubilførarunum ávirkar føroyingar. 26 % siga vinnubilførarar, sum tosa í fartelefon, ávirka teirra hugburð til fyritøkuna sera neiligt, meðan 29 % siga so um teir, sum koyra ov skjótt.

## UMDØMIÐ MUNANDI BETRAÐ, UM FYRITØKUR TAKA ÁBYRGD

Føroyingum dámar væl tankan um, at fyritøkur taka sosiala ábyrgd. 31 % siga, at umdømi fyritøkunar verður betrað í stóra mun, um fyritøkur til dømis stuðla arbeiðnum fyri tryggari atferð í ferðsluni. 26 % siga í ávísan mun – tað vil siga 57 % eru jalig um fyritøkur, sum taka sosiala ábyrgd.

> *Duga tey líka illa at reka sína vinnu sum at koyra bil?*

# ÁTØK 2013

## 112 DAGAR

Annað árið á rað hevur RFF luttikið í ferðsludøgum, sum SSP samskipar. Endamálið við degnum er, at børnini fáa ein stuttligan og læruríkan dag um ferðslu, eldsbruna, bjarging og um at ringja 1-1-2. Øll barnagarðsbørn í Tórshavnar kommmunu, sum fóra í skúla heystið eftir vóru boðin. Ferðslutrygd hevði millum annað tann boðskap at greiða børnunum frá, hvussu tey ganga rætt yvirum ein veg.

## HJÁLMAR

Í 2013 vórðu hjálmar lætnir 1. og 2. floksnæmingum. Seinnu árini hava teir verið lætnir í 2. floksnæmingum, har næmingarnir onga munnliga frágreiðing fingu um hjálmin. Við tað at løgreglan vitjar landsins 1. flokkar, metti Ráðið, at boðskapurin kom greiðari til næmingarnar, um løgreglan samstundis greiðir frá týdninginum av súkkluhjálmi. Ráðið hevur í hesum høpi latið løgregluni kring landið sonevndar pinkuhjálmar til at gera frálæruna livandi.

## FERÐSLUDAGAR Í PERLUNI

Ferðsludagarnir vórðu hildnir fyri landsins 8. flokkum og Tekniska skúla eins og undanfarin ár. Á ferðsludegnum fáa næmingarnir framløgur frá koyrilærara, løgregluni, sjúkraflutningstænastuni, einum avvarðandi til ferðsluvanlukku. Í 2013 var fyri fyrstu ferð eisini Hjálmar Dam, sjónleikari, undir yvirskriftini, 'Kjak, grundan og støðutakan'. Eftirmegingarnar vístu, at næmingunum dámar stak væl ferðsludagarnar, eins og skotsmálini frá lærarunum vóru sera góð. Umframt at næmingarnir eftirmeta ferðsludagin, verða teir spurdir um hugburð og royndir í ferðsluni. Her var greitt, at nógv er at arbeiða víðari við.

## HUGBURÐUR HJÁ LUTTAKARUM

### FRÁ FERÐSLUDØGUM

- **Útivið fimti hvør** næmingur í 8. flokki hevur verið í bili, har bilførarin var rúsað/ur. Í Tekniska skúla hevur meir enn triði hvør roynt tað sama.
- **23 %** í 8. flokki siga, at tað kemur fyri, at onkur tey kenna væl koyrir við kenning. Hetta talið er næstan dupult so stórt millum tey í Tekniska skúla (42,3 %).
- **2/3** í 8. flokki høvdu roynt at steðgað onkrum, sum tey vistu koyrdi við kenning. 80 % av næmingunum í Tekniska skúla høvdu gjørt tað sama.
- **Umleið 10. hvør** næmingur í 8. flokki hevur sitið í bili, sum koyrdi skjótari enn 180 km/t. Í Tekniska skúla hava 2/5 koyrt skjótari enn 180 km/t.
- **63,7%** í 8. flokki hava verið í bili, har tey hildu bilførarin koyrdi svakt. Tað sama ger seg galdandi fyri 84,5 % av næmingunum í Tekniska skúla.
- Í 8. flokki halda **58,7 %** av næmingunum, at tað ber til at læra ung ikki at koyra skjótt. Í Tekniska skúla halda 43,7 %, at hetta ber til.
- **3/5** av næmingunum í 8. flokki hava áður havt um ferðslutrygd í skúlanum. 9 út av 10 í Tekniska skúla hava somuleiðis áður havt um ferðslutrygd í skúlanum.





## FERÐ

Ferðin er størsti dreparin í ferðsluni, hetta verða vit afturvendandi mint á. Saman við Trygd hevði Ráðið í mai mánaði átakið, 'Vel røttu síðuna', har endamálið var at fáa vaksandi part av føroyingum at halda hámarksferðina. Harumframt at tað ikki verður góðtikið millum manna at koyra ov skjótt.

Talan var um somu filmar og lýsingar sum í 2012. Átakið vardi í tvær vikur, har filmarnir báðir vórðu vístir í sjónvarpi, eins og lýsingar vóru í bløðunum og útvarpinum. Átakið var eisini í samstarvi við løgregluna, sum gjørdi ferðkanningar í sama tíðarskeiði.

## GALLUPKANNING

Í sambandi við átakið varð gallupkanning gjørd. Hon vísti, at 60% siga seg vanliga bróta hámarksferðina. Tó at ferð 10 km/t omanfyri hámarksferðina kunnu fáa stórar avleiðingar, koyra heilt nógvir føroyingar ov skjótt.

Í kanningini er greitt, at 39 % av føroyingum siga seg vanliga koyra 80 km/t ella lægri. Tó at parturin, ið brýtur hámarksferðina er stórur, fegnast Ráðið um, at ein ítøkiligur bati er at síggja í mun til 2012, har gallupkanning vísti, at bert 32 % søgdu seg halda hámarksferðina, har 80 km/t er loyvt at koyra, meðan 66 % søgdu seg vanliga koyra skjótari.

## KVINNUR HELDUR LÓGLÝDNARI

Kvinnur søgdu seg í størri mun halda hámarksferðina – 42 % kvinnur, og 36 % av monnum halda hámarksferðina. Tó koyra 49% av kvinnum 90 km/t, meðan 47 % av monnum gera tað.



## HÚSKI VIÐ HÆGSTU INNTØKUM KOYRA Í MESTAN MUN OV SKJÓTT

Eins og í gallupkanningini í 2012 vísti seg, at bilførarar við høgum inntøkum í mestan mun bróta hámarksferðina. Av húskjum við samlaðari inntøku yvir 601.000 kr søgdu 29 % seg halda hámarksferðina, meðan restin segði seg vanliga koyra skjótari. Hetta er óbroytt frá beint eftir átakinum í 2012. 38 % av húskjum við samlaðari inntøku millum 250.000 og 600.000 kr. siga seg vanliga halda hámarksferðina móti 28 % teirra í fjør, tað vil siga ein bati. Av húskjum við inntøkum undir 250.000 kr. siga 63 % seg halda hámarksferðina.

## 56% VILJA HAVA HÁMARKSFERÐINA UPP

Eisini vísir gallupkanningin, at 42 % av føroyingum halda upp í 80 km/t vera hóskandi hámarksferð á landsvegum, men at 43 % halda, at 90 km/t hevði verið hóskandi. 11 % halda 100 km/t vera hóskandi. Hetta er á leið somu tøl sum gallupkanningin í 2012. Ferðslutrygd metir ikki, at fyrimunirnir við at seta hámarksferðina upp vigar upp móti vansunum.

### HVUSSU SKJÓTT KOYRIR TÚ VANLIGA Á EINUM VEGI VIÐ HÁMARKSFERÐAMARKI Á 80 KM/T?




### HVUSSU SKJÓTT KOYRIR TÚ VANLIGA Á EINUM VEGI VIÐ HÁMARKSFERÐAMARKI Á 80 KM/T?



*framhald*

# ÁTØK 2013

## 'RÁNIÐ' – ÁTAK FYRI UNG

Ungfólk eru yvirumboðað í ferðsluvanlukkum. Tey eru lutfalsliga fá í ferðsluni, men standa fyri einum stórum parti av vanlukkunum. Við trimum øðrvísi viralum stuttfilmum undir samlaða heitinum 'Ránið', vildu Ráðið saman við Tryggingarfelagnum Føroyar økja tilvitskuna hjá ungfólki at bera seg rætt at í ferðsluni.

Sum fyrireiking til átøkini skipaðu Tryggingarfelagið Føroyar og Ráðið fyri trimum fokusbólkum fyri ung kring landið, har tey umrøddu sín hugburð til ferðslu. Her var millum annað greitt, at um tey skuldu tíma at deila nakað á facebook, skuldi tað vera stuttligt – og um tað var upprunaføroyskt, var tað serliga forkunnugt. Teimum dámdi væl hugskotið um 'Ránið'.

## RÁNSMENN Í GEKKASKORTUM

Stuttfilmar vóru bara at síggja í biografi og á internetinum, tí tað eru miðlarnir, sum ung í Føroyum brúka mest. Filmarnir snúðu seg um fýra ránsmenn í gekkaskortum, sum hava trupulleika at sleppa undan løgregluni, tí ein teirra megnar ikki at bera seg rætt at í ferðsluni. Samstundis sum filmarnir vóðru á internetinum var Memes-kapping á facebook, har tað ráddi um at gera egnar útsagnir til filmarnar. Vinningur var iPad.

Filmarnir eru skemtiligir og munandi øðrvísi enn hvat við eru von við í Føroyum. Her er eingin fremstifingur at hóma í boðskapinum – í staðin tosar filmurin sítt egna mál, ið ungdómurin skilur. Teir tríggir filmarnir snúðu seg um rúsdrekkakoyring, bilbelti og gáloysni.

Filmarnir vórðu væl móttikinir. Á youtube.com sæst, at teir tilsamans hava verið vístir 21.300 ferðir.

## ÁRSINS SJÓNVARPSLÝSING 2013: 'RÁNIÐ'

Felagið Føroysk Marknaðarfólk skipaði fyri forvitnisligari kapping fyri bestu lýsingar í 2013. Føroysku brúkararnir høvdu atkvøtt um bestu lýsingarnar á netinum.

Kappingin var skipað í trimum bólkum, har besta sjónvarpslýsing, besta blaðlýsing og besta marknaðarátak skuldu kjósast, og úrslitið var at Ráðið fyri Ferðslutrygd og Tryggingarfelagnum Føroyar vunnu fyrsta bólkin fyri stuttfilmin 'Ránið'.

## VERNDAREINGLAR

Hetta er annað árið, at Ráðið í samstarvi við Tryggingarfelagið Føroyar letur einglaveingir til láns saman við tasku av endurskinum at býta út. Í ár vóru nýggir vakrir veingir sniðgivnir av Lailu av Reyni, og seymaðir av næmingum hennara á Tekniska skúla. Eins og í 2012 vóru veingirnir sera væl móttiknir. At kalla øll veingjapørini vóru úti kring landið flestu dagarnar. Hetta var til alskyns tiltøk so sum tendring av jólatrøum við býráðspolitikarum sum einglar; jólaveitslum í skúlum ella bara har foreldur ella skúlastýri vóru kring skúlan ein vetrarmorgun í jólamánaðinum, tá næmingarnir møttu.

## 'VINIR LOVA IKKI VINUM AT KOYRA SKÍT'

Átak at steðga rúsdrekkakoyring var meðan jólaborðhaldini vóru í november-desember. Flestøll venda sær frá rúsdrekkakoyring. Kortini er tað eitt kent fyribrigdi. Tað kann vera langt frá hugburði til atferð. Við hesum kenda átakinum, 'Vinir lova ikki vinum at koyra skít' á portalum, útvarpinum og facebook eggjaði Ráðið aftur fólki til at leggja seg útí, um tey varnast, at vinfólk, skyldfólk ella starvsfelagar ætla at koyra ávirkað.






## 4 AV 5 HØVDU ROYNT AT FORÐAÐ ØÐRUM AT KOYRA VIÐ OV HØGARI PROMILLU

Í gallupkanning beint áðrenn átakið vórðu føroyingar spurdir, í hvønn mun teir høvdu roynt at forðað tí, um teir sóu ein, sum ætlaði sær at koyra bil, hóast hann/hon hevur drukkið rúsdrekka, og væntandi hevði ov høga promillu.

Kanningin vísti, at 82 % av føroyingum heilt vist høvdu roynt at forðað tí. 13 % søgdu, at tey kanska høvdu roynt at forðað tí. Bert 1 % sigur, at tey ikki høvdu lagt seg útí. Hetta vísir, at ein munandi partur tekur frástøðu frá rúsdrekkakoyring, men at tað kortini er ein partur, sum ikki heldur seg hava skyldu at forða tí.

## TEY YNGRU TAKA Í MESTAN MUN FRÁSTØÐU

Hyggja vit at kynsbýtinum í gallupkanningini, er munurin ikki tað stórur – 84 % av kvinnum og 80 % av monnum siga seg heilt vist forða rúsdrekkakoyring.

Í aldursbýtinum er greitt, at eldru ættarliðini í minni mun vilja leggja seg útí enn tey yngru. Millum føroyingar 60 ár og eldri, svara 74 % játtandi, meðan tað millum tey 25-39 ára gomlu eru 89 % sum heilt vist høvdu forðað sínum medmenniskjum at koyra við ov høgari promillu.

Hetta stuðlar undir varhugan av, at hugburðurin til rúsdrekka er munandi broyttur seinnu árini, og fólk í alt størri mun taka frástøðu frá rúsdrekkakoyring.

**Í HVØNN MUN HEVÐI TÚ ROYNT AT FORÐA TÍ, UM TÚ SÁST EIN, SUM ÆTLAÐI SÆR AT KOYRA BIL, HÓAST HANN/HON HEVUR DRUKKIÐ RÚSDREKKA?**

*(Og væntandi hevði ov høga promillu)*









**RÁÐIÐ FYRI FERÐSLUTRYGD**

TUNGUGØTA 4 · POSTSMOGA 3209 · 110 TÓRSHAVN · TEL. 220064 · TELDUPOSTUR: RFF@RFF.FO · WWW.RFF.FO